## Ronaldo slapp væl

Tað mundi gingið heilt galið hjá Christiano Ronaldo í gjáramorgunin, tá hann var á veg til morgunvenjingina hjá Manchester United. Annað hjólið framman reyk av reyða Ferrari bilinum hjá Ronaldo. Hetta hendi í einum tunnili tætt við flogvøllin í Manchester. Christiano Ronaldo slapp tó óskalaður frá hendingini. Aftaná óhappið stóð Ronaldo og hugdi eftir vrakinum saman við fleiri eygnavitnum. Enska blaðið, The Guardian hevur tosað við eitt eygnavitni, sum sá tilburðin. - Eg kom á staðið beint aftaná hendingina. Tað er ófatuligt, at Ronaldo er sloppin so væl frá hendingini. Segði eygnavitni við The Guardian. Ferðsluóhappið hendi kl. 10.20 hósmorgunin, men eingin annar bilur fekk skaða í hendingini. Seinni møtti Christiano Ronaldo til venjingina hjá Manchester United.

## Landsliðsspælari til Tjaldur

Tjaldurskvinnur hava funnið sær styrk við einum fyrrverandi rumenskum landsliðsspælara. Dimmalætting skrivar, at 36 ára gamla Marinela Patru nú skal styrkja um hópin hjá Tjaldri. Marinela hevur spælt 112 landsdystir fyri Rumenia, og sjey ferðir hevur hon verið ávíkavist meistari og steypavinnari í Rumenia, umframt at hon eisini hevur vunnið lands- og steypakapping í italskum hondbólti.

# Fyrrverandi B36-venjari talentleitari í Brøndby

**Svenski Per-Olov Andersson, vanliga nevndur 'Pelle', sum eitt skifti var venjari hjá B36, varð í gjár settur í starv sum talentleitari hjá Brøndby IF**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Svenski Pelle Andersson, sum var venjari hjá B36 ein part av kappingarárinum í 2000 var venjari hjá B36, hevur seinastu trý árini verið talentleitari (scout) í enska stórfelagnum, Chelsea. Fyri tveimum mánaðum síðan varð hann tó uppsagdur saman við 13 øðrum talentleitarum, men hann náddi ikki at ganga arbeiðsleysur leingi. Í gjár setti danska Brøndby IF nevniliga hann í starv sum norðurlendskur talentleitari í felagnum. Hetta arbeiði fekk hann saman við norska Bjørn Magne, sum eisini er ein av teimum 14 uppsøgdu í Chelsea.

### Eigur met í Chelsea

43 ára gamli Pelle Andersson, sum er ættaður úr Lindö í Svøríki, gjørdi um seg í Chelsea. Í 2005 setti hann met fyri at hava leitað fram dýrasta U18-leikara í heiminum, tá ið hann ráddi Chelsea til at keypa tá 16 ára gamla verjuleikaran, Slobodan Rajkovic, frá OFK Belgrad fyri smáar 34 milliónir føroyskar krónur. Nú 19 ára gamli Rajkovic, sum hevur leikt tveir landsdystir fyri Serbia, er í løtuni útleigaður til hollendska FC Twente.

### Stórar vónir til Pella

Ítróttarstjórin í Brøndby IF, Anders Bjerregaard, hevur stórar vónir til Pella og norska arbeiðsfelaga hansara.

- Vit síggja Norðurlond sum heimamarknað okkara, og vilja fegnir hava teir bestu leikararnir hiðani. Hesir talentleitararnir hava eina breiða vitan og drúgvar royndir frá virkseminum í Chelsea. Eg eri sannførdur um, at vit kunnu læra nógv av hesum, sigur Anders Bjerregaard við Ekstrablaðið.



*Pella Andersson gjørdist ikki drúgvur í venjarasessinum hjá B36, tá hann á sumri í 2000 varð sendir til hús. Hann hevur tó hildið fram innan fótbóltsyrkið, og eftir at hava starvast fyri Chelsea, er hann nú starvi sum talentleitari hjá danska Brøndby*

## Dystir um vikuskiftið

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 11.01 | 14.30 | StÍF-Neistin |
| 11.01 | 15.00 | Stjørnan-VB |
| 12.01 | 19.00 | Kyndil-Tjaldur |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 11.01 | 16.00 | StÍF-Neistin |
| 11.01 | 16.00 | VÍF-H71 |
| 11.01 | 16.00 | Kyndil-KÍF |

### Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 10.01 | 14.00 | KÍF-ÍF |
| 10.01 | 14.30 | TB-Dráttur |
| 11.01 | 15.00 | Fleyr-Mjølnir |

**Eik-ligan, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 10.01 | 13.00 | Fleyr-Mjølnir |
| 11.01 | 14.00 | ÍF-SÍ |




## Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 10 | 8 | - | 1 | - | 1 | 277 | 203 | 74 | 17 |
| 2 VB | 10 | 8 | - | 0 | - | 2 | 278 | 219 | 59 | 16 |
| 3 Tjaldur | 10 | 5 | - | 2 | - | 3 | 263 | 238 | 25 | 12 |
| 4 Neistin | 10 | 4 | - | 3 | - | 3 | 252 | 242 | 10 | 11 |
| 5 StÍF | 10 | 2 | - | 0 | - | 8 | 229 | 294 | -65 | 4 |
| 6 Kyndil | 10 | 0 | - | 0 | - | 10 | 173 | 276 | -103 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 10 | 8 | - | 0 | - | 2 | 275 | 253 | 22 | 16 |
| 2 Neistin | 10 | 7 | - | 0 | - | 3 | 304 | 287 | 17 | 14 |
| 3 H71 | 10 | 6 | - | 0 | - | 4 | 266 | 237 | 29 | 12 |
| 4 StÍF | 10 | 4 | - | 2 | - | 4 | 245 | 244 | 1 | 10 |
| 5 Kyndil | 10 | 2 | - | 2 | - | 6 | 246 | 274 | -28 | 6 |
| 6 KÍF | 10 | 1 | - | 0 | - | 9 | 238 | 279 | -41 | 2 |

## Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | settmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 12 | 11 | - | 1 | 35 | 16 | 19 | 22 |
| 2 Mjølnir | 11 | 7 | - | 4 | 25 | 17 | 8 | 14 |
| 3 Fleyr | 11 | 7 | - | 4 | 24 | 16 | 8 | 14 |
| 4 Dráttur | 11 | 6 | - | 5 | 24 | 21 | 3 | 12 |
| 5 ÍF | 11 | 6 | - | 5 | 22 | 18 | 4 | 12 |
| 6 KÍF | 11 | 2 | - | 9 | 16 | 27 | -11 | 4 |
| 7 TB | 11 | 0 | - | 11 | 2 | 33 | -31 | 0 |

**Eik-ligan, menn**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | settmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 6 | 5 | - | 1 | 17 | 5 | 12 | 5 |
| 2 SÍ | 6 | 4 | - | 2 | 13 | 10 | 3 | 4 |
| 3 Fleyr | 6 | 3 | - | 3 | 10 | 11 | -1 | 3 |
| 4 Mjølnir | 6 | 0 | - | 6 | 4 | 18 | -14 | 0 |